# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um lungnahinnukrabba (mesotheliom)

## Sjúkueyðkenni tengd at lungnahinnukrabba

Illgruni um lungnahinnukrabba kann standast av einum ella fleiri av niðanfyri nevndu sjúkueyðkennum

- Langtíðar pína í bringuni
- Andaneyð
- Pleuravæta > 1 ferð øðrumegin uttan upplagda orsøk (recidiverandi)

Eisini kann vera til staðar

- Ávirkað almennstøða
- Vekttap
- Anæmi

Lækni eigur at bíleggja røntgen av thorax áðrenn ávísing verður send til krabbameinsútgreining

## Grundaður illgruni

Grundaður illgruni um lungnahinnukrabba íkemur um eitt ella fleiri tekin eru á røntgen thorax:

- Kálkingar
- Tjúkdarøkt pleura
- Ífylla í pleura
- Krympað pleura
- Pleuravæta øðrumegin

## Vandabólkar

Innanding av asbest er ein væl kend orsøk til lungnahinnukrabba. Ekspostión tengd at arbeiði er oftari hjá monnum, og tískil er títtleikin av lungnahinnukrabbi hægri hjá monnum (5:1). Tubbaknýtsla er ikki tengd at vandanum fyri lungnahinnukrabba.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um lungnahinnukrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026